ein myndarøð í tólv pørtum, har summi lørift vóru abstrakt, onnur figurativ samstundis, sum okkurt av tí nonfigurativa í veruleikanum var figurativt, so sum forstørraðar heilakyknur, ið minna um eitt dekorativt mynstur.

## Nú skal tað vera

Rannvá Holm Mortensen gleðir seg til Indiaferðina, har hon í heilar fimm mánaðir kann miðsavna seg um myndlistina.

Yngsta barnið er júst flogið úr reiðrinum og Rannvá hevur nógvar ætlanir. Millum annað ætlar hon at byggja eitt rúmligt atelier, so hon fær pláss at skapa stórar myndir. Í novembur hevur hon eina framsýning í Lyngby og júst í hesum døgum hevur hon framsýning í Stephanssons Húsi á Kongabrúnni í Havn.

Hon er greið yvir, at hóast listin er markleys, er tíðin avmarkað. ■



Mynd: Alvur Haraldsen





